# Tíðindaeyðkenni og tíðindafrymlar

Greitt verður frá tíðindaeyðkennunum, bygnaðinum í tíðindatríkantinum og hvussu kommodufrymilin skal lesast.



**Kommodufrymil**
Kommodufrymilin er ein **skrivifrymil**. Teksturin er býttur í brot við hvør sínum evni eins og kommodur hava skuffur við ymiskum innihaldi. Hvørt brot hevur eina yvirskrift, sum verður kallað millumyvirskrift.

## TÍÐINDATRÍKANTURIN

**Størst týdning**
**HVØR, HVAT, HVAR?**

**Stóran týdning**
**HVUSSU?**

**Týdning**
**HVÍ?**

**Minni týdning**
**HVAT SO?**

**Smálutir í søguni**

## Tíðinda-eyðkenni

**Tíðarbært**
– Tíðindagreinin skal snúgva seg um okkurt, sum er nýtt og forvitnisligt.

**Týdningarmikið**
– Innihaldið skal hava týdning fyri lesaran.

**Tín innliving**
– Lesarin skal kenna seg aftur í tí, sum skrivað verður um.

**Tíðindi, ið vekja ans**
– Tíðindini skulu gera teg ovfarna/n.

Nem í sætta síða 58, 70, 72